## Ávaring á netinum

Ein ivasom ávaring, sum sigst koma frá Falck, ferðast nú á netinum. Ávaringin sigur, at ein ung kvinna er blivin burturførd av einum náttklubba, neyðtikin fleiri ferðir og síðani tveitt á gøtuna. Skrivið vil vera við, at hon var dopað við Rohypnol, vanliga nevnt "date-rape-drug", og Progesterex, sum verður sagt at vera ein lívssøristablett. Skrivið siterar donsku løgregluna fyri at siga, at Progesterex hevur verið alsamt meiri at sæð í seinastuni í neyðtøkumálum, tí hetta loyvir neyðtøkumonnum bæði at neyðtaka OG sterilisera offrið. Progesterex er eitt evnið, sum er kent innan djóraheimin, til sterilisation av størri djórum. Hetta verður eisini latið í drinkin, og tryggjar, at kvinnan ikki gerst við barn.



## Ávaringin er helst følsk

Men sambært Djóralæknastovuni í Havn, er hetta ikki eitt kent djóramedisin. Tað verður ikki nýtt í Føroyum, og tað er heldur ikki at finna á góðkenda listanum fyri djóramedisin í Danmark. Tey avsanna tó ikki, at hetta kann vera eitt medisin í onkrum øðrum landi. Googlar tú "Progesterex", er forkláringin eisini, at hetta er eitt uppáfunnið evnið, ið ikki finst í veruleikanum, men bert finst í eini ávaringarsøgu, sum ferðast á netinum. Men hóast vandi ikki er fyri at gerast lívssørur, so er Rohypnol tó eitt kent evni, nýtt av neyðtøkumonnum. So ávaringin má tó vera: ansa tær eftir drinkinum!



Arbeiðið við oljutangunum skal verða liðugt um hálvan mars. Um 1-2 vikur byrja teir at leggja rørleiðingarnar

# Heppin arbeiðis



*- Hetta er eitt gott arbeiði, og lønin er bara rímilig, sigur Bergur Joensen*

**– Vit átaka okkum arbeiðir kring allan heimin. Men tá eg fekk møguleikan at sleppa heim til Føroyar at arbeiða, tók eg sjálvandi av, sigur Bergur Joensen úr Hvalvík, men sum hevur bústað í Esbjerg. Hann er ein av monnunum, sum í hesum døgum byggir tríggjar oljutangar í Fuglafirði**

HANDVERK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Fuglafjørður:** – Eg havi so altíð arbeiði, og her er iva-leyst at gera hvønn einasta dag, sigur Bergur.

Vit hittu hann ein kaldan dag í farnu viku, har hann, saman við átta øðrum dønum arbeiddi við at seta upp oljutangar á Enninum í Fuglafirði.

Arbeiðið skuldi verið byrjað nakað fyrri, men fyrst í desember mánaði í fjør fóru teir av álvara til verka við tangunum, sum koma at innihalda bæði fuel-olju og gassolju.

Talan er um eitt stórt arbeiði, men tað hevur higartil gingið eftir vild.

- Veðrið var ikki serliga lagaligt í desember mánaði. Men vit ætla, at tað skal verða liðugt til ásetta tíð - miðskeiðis í mars mánaði, sigur Bergur.

Hann arbeiðir fyri donsku fyritøkuna Team Welding, sum útleigar arbeiðsfólk til aðrar fyritøkur.

Í hesum døgum arbeiðir hann hjá Bladt Industries, sum m.a. hevur stálarbeiði